# Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 264i Toftir

Dagfest 27.03.2023

NES KOMMUNA
Ein kommuna fyri øll

# ÁSETINGARNAR

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir við seinri broytingum, hevur býráðið fyri Nes kommunu samtykt ásetingarnar fyri hesa serstøku byggisamtykt sum nærri nágreinað í hesum skjali.

Hendan serstaka byggisamtyktin tekur støði í teimum serviðurskiftum, ið gera seg galdandi fyri matr. nr. 264i, Toftir, og teimum ásetingunum, ið víkja frá tí almennu byggisamtyktini fyri kommununa.
Øll bygging og aðrar atgerðir í økinum, ið byggisamtyktin fevnir um, skal vera í tráð við byggisamtyktina hjá Nes kommunu og almennu byggikunngerðina BK17.

FORORÐ

Ætlanin við hesi serstøku byggisamtykt er at at geva loyvi til íbúðarbygging, á matr. nr. 264i, Toftir.

***§1 Øki samtyktarinnar***

*Stk. 1. Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum víst er á kortskjali 1, matr. nr. 264i, Toftir, og allar jarðarlutir, ið eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ogn.*

***§2 Endamál og frágreiðing***

*Stk. 1. Endamálið við serstøku byggisamtyktini er at skipa íbúðarbygging innan fyri markamótini í kortskjali 1.*

*Stk. 2. Útstykkingin er uml. 8846 m² til støddar, og liggur í einum A2 øki.*

*Stk. 3. Um viðurskifti eru, ið ikki verða ásett ella nágreinað í hesi serstøku byggisamtykt, eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Nes kommunu galdandi.*

*Stk. 4. Samtyktin skal tryggja:*

- *At byggingin í hesum øki verður framd eftir fyriløgdu byggiætlan*
- *At øll byggingin á økinum verður í tráð við ásetingarnar í hesi serstøku byggisamtykt og almennu samtyktini fyri kommununa*

***§3 Byggingin***

*Stk. 1. Øll bygging í økinum, ið serstaka byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggivaldið.*

### *§4 Bygging, vav, v.m.*

*Stk. 1.* *Byggistigið má í mesta lagi verða 0,4.*

*Stk. 2.* *Hæddin á íbúðarbygningunum kann í mesta lagi verða 17m frá lidnum túni til mønu. Loyvt verður bygging í fýra hæddum við tekju afturat.*

*Stk. 3.* *Planeringskota verður ásett av byggivaldinum.*

### *§5 Bygningstrekk, tilfarsval og útsjónd*

*Stk. 1.* *Kommunan skal góðkenna út- og umbyggingar og nýbyggingar.*

### *§6 Spillvatn og kloakk*

*Stk. 1.* *Kloakkin verður bundin í kommunalu kloakk- og spillvatnsleiðingarnar.*

### *§7 Byggimyndugleiki og átalurættur*

*Stk. 1.* *Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Nes býráði einsamøllum.*

### *§8 Undantakloyvi og broytingar frá byggisamtyktini*

*Stk. 1.* *Smávegis lættar frá reglunum í hesi byggisamtyktini kann byggivaldið í serstøkum føri loyva, um so er, at tann dámur, ið byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av hesi orsøk.*

*Stk. 2.* *Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.*

BÝRÁÐSSAMTYKT
OG GÓÐKENNING

Serstaka byggisamtyktin fyri **Nes kommunu - matr. nr. 264i Toftir**, er hervið samtykt av Nes býráði og góðkend av Umhvørvismálaráðnum.

Nes býráð

Umhvørvismálaráðið

____________________________________
Súni í Hjøllum, borgarstjóri

# Kortskjal 1

